# Pamela eftir kópinum

Tann amerikanska filmskvinnan Pamela Anderson hevur sent kanadiska forsætisráðharranum, Stephen Harper, bræv við einari inniligari áheitan um, at Kanada gevst at veiða kóp. Pamela Anderson var í Vancouver um vikuskiftið og koyrdi brævið í ein postkassa har, meðan ein fjøld av tíðindafólki og myndamonnum fylgdu við. Kanadiskir veiðimenn veiða umleið 275.000 kópar um árið, men Pamela Anderson vil hava Kanada at banna øllum handli við kópaúrdráttum, eins og ES hevur gjørt. Bannið skal tó ikki umfata upprunafólkið, sigur hon.





t. Fakligi førleikin er størri, enn hann hevur verið. Gróðurkanningarnar eru eitt av reiðskapunum, sum vit brúka og fara at brúka meiri aktivt

Mynd: Vilmund Jacobsen

if Gaard, stjóri á Havstovuni

### Hjalti avkláraður

Vit spurdu eisini Hjalta í Jákupsstovu, hvussu tað kennist at fara úr starvinum, sum hann hevur røkt í samfull 22 ár?

- Hetta er sjálvandi nakað, eg havi hugsað um leingi. Nú havi eg vant meg við tankan, og í dag eri eg púra avslappaður og avkláraður um tað.

Spurdur um størsta frambrot hjá Havstovuni í hansara tíð sum stjóri, sigur Hjalti, at tað var, tá stovnurin fekk Magnus Heinason og byrjaði regluligar kanningar við skipinum.

- Eitt annað stórt frambrot, sum hevur havt stóran týdning fyri metingina av grundarlagnum undir okkara fiskastovnum, er gróðurkanningarnar.

Hjalti í Jákupsstovu sigur, at tann vitan, sum teir fingu við regluligu kanningunum við Magnusi Heinasyni, hevur verið óvurderilig fyri Havstovuna, sum hann tekur til.

- Men henda vitan má alla tíðina haldast við líka. Tí síggi eg eisini fram til, at Havstovan helst áðrenn langt um líður fær eitt nýtt skip fyri Magnus Heinason.

### Góður stjóri

Vit spurdu eisini Hjalta í Jákupsstovu, um hann hevur nøkur góð ráð til eftirmannin, Eilif Gaard.

- Nei, tað vildi verið púrasta burturvið av mær at givið honum góð ráð. Hann noyðist sjálvur at finna síni bein, og síðan virka út frá hesum. Men eg ivist onga løtu í, at Eilif Gaard verður ein góður stjóri, og honum nýtist ikki ráð frá mær til hesa uppgávu, sigur Hjalti í Jákupsstovu.

# Havsbrún keypt góð 30.000 tons

**Higartil í ár hava bara útlendsk skip landað til Havsbrún í Fuglafirði. Talan er serliga um tvey írsk systirskip og nakrar norskar bátar**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Aftur í dag landa írsku trolararnir Father Mc-Kee og Brendelen í Fuglafirði. Hetta er fimtu ferð í ár, at hesi bæði skipini landa í Fuglafirði.

Veiðan hjá teimum lítla fiskaslagið havgøltur, og skipini plaga hava millum 1200 og 1300 tons í part hvønn túrin.

Í løtuni roynir Havsbrún at fáa onkran norskan bát, sum fiskar lodnu í norska partinum av Barentshavinum, at leggja leiðina inn á Fuglafjørð við veiðini.

Hartvig Joensen, sum starvast á Havsbrún, sigur, at samlaða ráfiskanøgdin hjá virkinum higartil í ár er farin um tey 30.000 tonsini.

Spurdur, hvussu stórur útlendski parturin av landingunum er, sigur hann, at virkið bert hevur fingið fisk frá útlendskum skipum í ár.

- Eingi føroysk skip hava landað í Fuglafirði higartil í 2010, sigur Hartvig Joensen.

Í 2009 vóru írsku systirskipini tey, sum førdu størstu nøgdirnar av pelagiskum fiski lands í Fuglafirði og vóru soleiðis ein týðandi partur av ráfiskagrundarlagnum hjá Havsbrún.

# Klaksvíkingar landa línufisk

**Hesa vikuna hava línuskip og trolbátar landað í Klaksvík, og væntandi koma partrolararnir Safir og Smaragd inn at landa seinni í vikuni**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tvey línuskip landaðu í Klaksvík í gjár.

Klakkur hevði 90.000 pund av brosmu og longu, og Kvikk hevði sløk 80.000 pund, meginparturin var hýsa.

Trolbáturin Fiskaklettur landaði eisini í Klaksvík í gjár. Teir høvdu sløk 54.000 pund tilsamans, harav vóru 29.000 pund av upsa og sløk 10.000 pund av havtasku.

Í morgin kemur línuskipið, Jákup B, undan Íslandi og trolbáturin Varðin undan Føroyum, men á landingarmiðstøðini í Klaksvík vistu tey ikki í morgun, hvussu gingist hevur hjá teimum hendan túrin.

Seinni í hesi vikuni vænta tey partrolararnar Safir og Smaragd til landingar í Klaksvík.

Partrolararnir, Nónhamar og Fjalshamar, sum herfyri skiftu eigara, fóru út á triðja túrin leygardagin, so teir eru ikki væntandi aftur hesa vikuna, um alt gongur sum ætlað.

Á Landingarmiðstøðini í Klaksvík verður sagt, at útróðurin hjá bátunum, ið royna við línu, er misjavnur.

- Summir dagar eru rættiliga góðir, og aðrir roynast minni væl.

Høgættin er ikki hin besta norðanfyri, men tá roynandi er, eru bátar eisini á útróðri.